tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 229 Mikudagur 27. november 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Naggatóðn

Steðgur í samráðingunum um virkini í Fiskavirking, og vinnulívsbólkurin er um at fella í fátt

Síða 9

## Boringin í Lopra ein ólukka

Norskt oljublað skýrir leitingina í Lopra eina ólukku, men umboð fyri SAGA vísur øllum pástandunum aftur

Síða 15

*Vilhelm Johannesen:*

## Sámal Petur í Grund sekur í politiskari forfylging

Síða 5

## Jákup heldur fram í Herfølge



Í vikuni fer Jákup Mikkelsen at skriva undir nýggjan sáttmála við Herfølge. Jákup verður verandi í felagnum til summarið 1997

Síða 16

*Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum:*

# Álvarsmál at hótta við einum boykotti



Formansskapurin í Løgtinginum eigur at taka støðuna hjá Sambandsflokkinum í málinum um stjórnmálanevndina til viðgerðar. Tað er eitt álvarsmál, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum

Síða 14

*Tingsamtyktin um stjórnmálanevnd:*

# Ein ósigur fyri meg og samgonguna

Síða 6



Men samtyktin fær onga ávirkan á avtalurnar, sum gjørdar eru í samgonguni, sigur løgmaður

VIT KOYRA ALT SLAG AV
VØRUKOYRING
ÆTLAR TÚ TÆR AT FLYTA!
VIT HAVA FLYTIKASSAR, GOYMSLU OG KAPPINGARFØRAR PRÍSIR
O.A. VØRUKOYRING
17727 · 88727
TILBOÐ VERÐA GIVIN


NÝTT!
Øssur Johannesen
"Solo BassGuitar"
Fyri hvørja fløgu bara 129,-
Vit senda kring landið
TUTL
SMS • TLF 14558

*Norska oljublaðið „Upstream" um Lopransboringina:*

# Ein ólukka

JAN MÜLLER

Boringin í Lopra gjørdist einki minni enn ein farsa, tvs. ein láturverdur og skilaleysur glantrileikur.

Soleiðis sigur Dan Rigden, London-blaðmaðurin hjá norska oljublaðnum „Upstream", sum júst er útkomið.

Blaðið skrivar, at tað eydnaðist heldur ikki at koma gjøgnum tjúkku basaltfláirnar, sum fjala allar oyggjarnar.

Víðari stendur, at eitt av oljufeløgunum, sum var við til at fíggja boringina í Lopra umrøður hana sum a „disaster" tvs. eina ólukku, hvørs upplýsingarvirði var lítið og einki.

-Vit høvdu havt lært nógv meira, um vit høvdu borað eina „joint industry well offshore" tvs. um oljufeløgini sjálvi høvdu staðið fyri eini boring úti til havs sigur umboð fyri eitt oljufelag við norska blaðið.

Víðari stendur, at boripallurin, sum varð brúktur, hevði ikki ta neyðugu orkuna til uppgávuna.

-Luttakararnir gjørdu av at steðga projektinum. Men tað er ógreitt, um hetta var tí, at pallurin ikki var førur fyri at bora longur niður skrivar blaðið.

Víst verður annars á, at boriætlanin gjørdist 66% dýrari enn upprunaliga ætlað.

Blaðið ger annars nógv burtur úr, at føroyska lisensumfarið enn einaferð er vorðið útsett.

-Hesaferð er hon útsett til tíðliga í 1998, meðan áhugað oljufeløg mugu halda fram við at verða plágað av óvissuni skrivar Dan Rigden.

Sambært blaðnum upplýsir Herólvur Joensen frá Oljufyrisitingini, at ætlaða oljulóggávan er seinkað og verður helst ikki løgd fyri løgtingið fyrr enn næsta summar. Hetta ber í sær, at lisensrundan verður antin seint í 97 ella tíðliga í 98, og helst í 98.

Blaðið upplýsir annars, at umboð 20 oljufeløg umboðandi 9 samtøk ella bólkar fara at vera við í royndarútboðingini, hvørs freist er 5. desember.




*Boripallurin „was not powerfull enough to the task" skrivar norskt blað. Myndin er av tilvildarligari smágentu, sum hevði pallin sum granna í eina tíð. Mynd jan*

*Terje Hagevang frá oljufelagnum SAGA vísir øllum aftur:*

# Lopransboringin gav okkum sera týðandi vitan

JAN MÜLLER

Eg kenni als ikki hatta blaðið, men kann bert siga, at tað, sum har verður skrivað um Lopraboringina er formetaliga negativt og beinleiðis ósatt.

Hetta sigur kanningarleiðarin hjá oljufelagnum Saga, Terje Hagevang við Sosialin í eini viðmerking til greinina í „Upstream".

-Eg eri fullkomiliga ósamdur við tað blaðið skrivar. Upplýsingarnir vit hava fingið við Lopransboringini eru sera týðandi vitan í kortleggingini hjá Saga av føroysku undirgrundini. Vit halda tí eisini at pengarnir til hetta projektið hava verið væl brúktir.



Terje Hagevang sigur, at hann hevur ikki loyvi at lata ítøkiligar upplýsingar um úrslitið, men tá blaðið skrivar, at komið varð ikki gjøgnum basalt, so vísir hann á, at tá teir góvust at bora vóru teir ikki í basalti. Meira vil hann ikki siga.

Hvat viðvíkur boripallinum so vísir hann til Danop, sum var operatørur.

Hvat viðvíkur prísinum so er tað als ikki óvanligt, at eitt boriprojekt verður dýrari enn ætlað. Hetta projektið varð eisini justerað, soleiðis at samlaða upphæddin var samsvarandi tí justeraða budgettinum.

